# Talan er um yvirtekning



*Sune Schwartz Jacobsen og Janus Petersen eru í hesum døgum á rundferð í Europa at leggja fram prospektið í sambandi við sølu av 66% av partabrøvunum í Føroya Banka*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tá Føroya Banki valdi at steðga fyri útboðnum av partabrøvum til íleggjarar undir 2 milliónir í kursvirði, so tað tað orsakað av yvirtekning. Tað váttar Jacob Fink, ráðgevi hjá bankanum**

PARTABRØV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var longu framman undan gjørt øllum greitt í prospektinum, at gjørdist talan um yvirtekning, fór útboðið til smærru íleggjararnar at steðga mikudagin klokkan 16. Og tað var júst tað, sum hendi.

At talan so var um yvirtekning lá sjálvandi í luftini, og hetta váttar Jacob Fink eisini fyri Sosialinum.

- Eg kann av góðum grundum ikki siga nágreiniliga, hvussu nógv yvirteknað er, tí eg kenni ikki endaligu tølini. Men sjálvt um eg hevði kent hesi, hevði eg ikki kunna avdúka tey kortini. Eg kann tó siga so mikið, at talan er um eina munandi yvirtekning, sigur Jacob Fink frá svenska Handelsbanken, sum er fremsti ráðgevi hjá Føroya Banka í sambandi við søluna av partabrøvunum.

Tað var týðiligt longu mánamorgunin, tá partabrøvini alment vórðu sett til sølu, at áhugin var ógvuliga stórur at ogna sær lut í Føroya Banka. Og sum nevnt var kvotan hjá smáu íleggjarunum longu uppi eftir trimum døgum. Tað merkir, at fólk í minsta lagi vilja seta 250 milliónir í bankan. Og tá so talan er um eina »munandi« yvirtekning, sum Jacob Fink málber seg, kann roknast við, at føroyingar vilja gera íløgur í bankan fyri millum 300 og 500 milliónir krónur.

Ofta hevur verið nevnt sum dømi, at um tú teknar teg fyri 200.000 krónum, og yvirtekningin verður 100%, so fær tú alt annað líka partabrøv fyri 100.000 krónur.

Tað er væl hugsandi, at hesi tøl ikki púrastani eru tikin úr leysum lofti.

### Áhugi millum teir stóru

Ein kann so spyrja seg sjálvan, hví útboðið til størru íleggjararnar ikki eisini steðgaði mikudagin klokkan 16. Er tað tí, at stóru íleggjararnir ikki hava eins stóran áhuga fyri bankanum sum teir smáu? Nei, ikki sambært Jacob Fink.

- Í sambandi við søluna av partabrøvum í Føroya Banka hava Janus Petersen og Sune Schwartz Jacobsen verið runt um í Europa at hava fundir við møguligar íleggjarar, og henda rundferð endar faktisk ikki fyrr enn týsdagin. Tað vildi tí verið púra ábyrgdarleyst at steðga útboðnum, áðrenn allir teir, sum fundur er avtalaður við, hava havt møguleika at bjóða, sigur Jacob Fink.

Men tað er í heila tikið tradítión fyri, at lata útboðsfreistina renna út í sambandi við størru íleggjarar, tá talan er um útboð av partabrøvum. Sakin er jú tann, at íleggjarar hava møguleika at bjóða upp á partabrøvini til ein ávísan kurs innan tær kursrammur, ið settar eru til søluna. Tað er eisini hesi boð til ávísar kursir, sum í síðsta enda fara av avgera endaliga kursin á partabrøvunum.

Og Jacob Fink leggur eisini dent á, at hóast útboðið til størru íleggjararnar er galdandi alt útboðsskeiðið, tað vil siga fram til 19. juni, so er hetta als ikki nakað tekin um, at eingin áhugi er, líka lítið sum tað einki sigur um, hvørt talan her eisini er um eina yvirtekning ella ikki

Ráðgevin hjá Føroya Banka í sambandi við søluna av partabrøvum váttar harafturímóti, at áhugin millum størru íleggjararnar er eins stórur sum roknað var við framman undan.

Nú er so lítið annað at gera enn at bíða, til 19. juni er farin aftur um, tí tástaðni fæst nærri at vita, hvussu endaligi áhugin millum størru íleggjararnar hevur verið.

# KROSSORÐ




## Vinnari:

*Erling Hansen*
*477 Funningsfjørður*

Loysunar-orðið: ............................................ **506**

Navn: ..............................................................

Bústaður: ......................................................

Bygd/býur: .....................................................

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: KINAMAÐURIN

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| K | A | L | D | B | A | K | S | F | J | Ø | R | Ð | U | R | |
| PA | T | O | S | | K | | Ó | | Ó | R | Á | Ð | | A | A |
| L | A | M | B | A | F | E | L | L | I | | Ð | | | D | N |
| EL | | B | | B | A | N | J | O | | G | I | L | E | A | D |
| A | K | U | R | | R | | U | N | G | I | N | | I | R | A |
| N | I | M | | E | | U | K | | Á | N | I | R | N | A | R |
| E | N | | I | V | A | S | O | M | | A | | O | G | N | |
| S | A | N | D | U | R | | P | A | R | | I | L | L | | S |
| 505 | K | A | I | | K | A | P | P | A | R | | F | A | R | T |
| N | Á | B | O | B | | T | I | P | S | I | | | L | E | A |
| I | L | | T | | E | | | A | K | T | A | Ð | I | | K |
| NE | | H | | T | E | I | N | | I | | S | | Ð | | I |
| L | A | J | K | A | | V | I | T | | S | T | Á | | R | R |
| S | J | Ó | N | L | E | I | K | U | R | | A | R | M | I | |
| RE | K | | | V | N | | K | R | Í | M | | N | Í | V | A |
| N | O | R | Ð | A | N | | A | K | K | E | R | I | N | U | M |

### Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** – *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** – *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** – *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** – *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Heimsatlas**

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***